## Einki verkfall

Í Bretlandi hevur ein dómstólur gjørt av, at tað fráboðaða verkfallið hjá flogternunum hjá British Airways er ólógligt, tí og tí verður verkfallið av ongum, sigur BBC. Flogternurnar høvdu boðað frá, at tær fóru í verkfall í tólv dagar frá 22. desember. Tað avgjørdu tær á einari uratkvøðugreiðslu hjá fakfelagnum, men dómstólurin sigur, at atkvøðugreiðslan var ólóglig, tí fólk, sum ikki vóru limir í felagnum sluppu at atkvøða. Leiðslan í British Airways er sera fegin um avgerðina hjá dómstólinum, tí at verkfallið hevði kostað felagnum einar 250 milliónir krónur um dagin.



## Samráðast við Ísland næsta ár

Makedonska tíðindastovan MINA visti í gjár at siga, at næsta ár fer ES at tingast við Makedonia og Ísland um limaskap í samveldinum. Tíðindastovan segði seg hava tíðindini úr Týsklandi, og at tað var Angela Merkel, kanslari, sum hevði sagt týskum politikarum á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn, at samráðingarnar við íslendingar og makedonar byrja í 2010. Sambært MINA eggjaði kanslarin teimum týsku limunum í Evropatinginumn til at viðgera øll mál um nýggjar limir í ES við vælvild. Evropatingið hevur sett Ísland og Makedonia á skránna fyri 2010.

# Við í áheitan á stjórnarleiðarar

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Kommuna*

Yvirlýsingin, sum borgarstjórin í Tórshavnar kommunu hevur undirskrivað saman við yvir 80 øðrum borgarstjórum, var seinnapartin í gjár handað heimsins stjórnarleiðarum í Bella-sentrinum, har teir royna at telva seg fram til eina altjóða veðurlagsavtalu.

Umframt ta stóru veðurlagsráðstevnuna í Bella-sentrinum, hava eisini borgarstjórarnir í fleiri av heimsins størstu býum sitið og tingast um veðurlagsbroytingarnar og hvat kann gerast fyri at tálma teimum. Á ráðstevnuni, ið bar heitið “Climate Summit for Mayors”, var eisini borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, sum saman við hinum skrivaði undir eina felags yvirlýsingin.

Týsdagin komu borgarstjórarnir ásamt um orðalagið í hesi yvirlýsing, sum teir seinnapartin í gjár handaðu stjórnarleiðarunum, ið nú eru komnir upp í tingingarnar um eina altjóða veðurlagsavtalu. Vegna teir yvir 80 borgarstjórarnar var tað Michael Bloomberg, borgarstjóri í New York, ið legði yvirlýsingina fram fyri stjórnarleiðararnar.

### Mugu byrja nú

– Vit biðja tykkum um at viðurkenna, at framtíðin hjá heimi okkara verður vunnin ella mist í heimsins býunum, siga borgarstjórarnir millum annað. Vit eru klár til at samstarva, hugsa nýtt og royna enn meira enn áður. Boð okkara til stjórnirnar eru einføld: Samtykkið víðskygd mál og byrjið at minka um útlatið nú – og verið sannførd um, at um býirnir eru við, eru sterkir og fáa rætta tilfeingið, so geva vit tað, vit hava bundið okkum til at geva, er niðurstøðan í yvirlýsingini.

Borgarstjórarnir senda í yvirlýsingini eini sterk og sameind boð til stjórnirnar um at fullfíggja avtaluna í Keypmannahavn og í altjóða høpi viðurkenna altavgerandi leiklutin hjá býum í bardaganum móti veðurlagsbroytingum. Teir vísa á, at býirnir umboða meira enn helmingin av heimsins fólki, umframt at upp til 75 prosent av heimsins útláti av vakstrarhúsgassum koma frá býarøkjum. Tí noyðast og vilja býirnir at taka vit ábyrgd í bardaganum móti veðurlagsbroytingum.

– Býir gera nakað. Vit vísa, at vit eru før fyri at gera nakað við veðurlagsbroytingar hvønn dag, við at skapa umfevnandi loysnir innan orkusparing, flutning, rusk, ljós, varandi orku, vatngoymslur, tillaging av broyttum hugburði og við at leggja ætlanir og skipa infrakervi, siga borgarstjórarnir í áheitan síni á stjórnarleiðararnar.

– Vit hava prógvað, at lokal veðurlagstiltøk ikki bara eru væleydnað, men eisini altavgerandi, um ætlanir og mál hjá tjóðini sum heild viðvíkjandi veðurlagsbroytingum skulu eydnast. Um tey eru væl gjørd og innførd á rættan hátt, skapa tey nýggjar hættir at røkka áhaldandi vøkstri, ið ikki skaðar náttúruna, og er góður fyri okkum øll.



*Borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, í práti við borgarstjóran í Havn, Heðin Mortensen, undir altjóða veðurlagsráðstevnuni í fyri borgarstjórar, “Climate Summit for Mayors”*

### Fáa borgararnar við

Borgarstjórarnir leggja somuleiðis stóran dent á, at umráðandi er at fáa borgararnar við, so teir við persónligum broytingum og “grønari livihátti” eru við til at loysa veðurlagskreppuna, samstundis sum býarleiðararnir ganga undan við framsóknum politiskum tiltøkum og ítøkiligum stigum til ætlanir og íløgur, ið betra umstøðurnar hjá borgarunum. – Vit heita á borgararnar um at vera við, meðan vit skapa eina betri framtíð fyri gongustjørnu okkara, stendur í yvirlýsingini.

– Býir menna seg. Gjøgnum árini eru vit farin undir veðurlagsætlanir, sum mangan hava verið meira framsóknar, enn tað landið hevur gjørt. Vit ætla okkum at halda áfram við hesum, men fyri at vit kunnu gera tað krevst, at vit hava sterkari samstarv millum landsog kommunustýri. Samstarv, ið fremur luttøku býanna í at røkka okkara felags máli: eina altjóða lág-kolevnis framtíð, ið kann liva við veðurlagnum.

# Føroysk undirskrift á veðurlagsskjal




TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Kommuna*

Í dag samdust borgarstjórarnir, sum eru savnaðir á serligari borgarstjóraráðstevnu um veðurlagsspurningar, um eina yvirlýsing, sum seinnapartin í morgin verður handað stjórnunum, ið eru savnaðar á veðurlagsráðstevnuni í Bella-sentrinum.

*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, skrivar undir yvirlýsingina frá yvir 80 borgarstjórum úr øllum heiminum, ið heita á heimsins stjórnarleiðarar at fáa í lag eina munagóða veðurlagsavtalu, áðrenn veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn er av*

Millum teir yvir 80 borgarstjórarnar úr øllum heiminum, ið settu sína undirskrift undir yvirlýsingina í dag, var borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen. Tey fyrstu at skriva undir, vóru Ritt Bjerregaard, yvirborgarstjóri í Keypmannahavn, og Michael Bloomberg, borgarstjóri í New York, og síðani komu allar hinar undirskriftirnar aftaná.

Í yvirlýsingini eggja borgarstjórarnir heimsins stjórnarleiðarum at gera eina sterka og víðskygda avtalu, ið verður veðurlagnum at frama. Samstundis heita borgarstjórarnir á heimsins leiðarar um at vísa góðan vilja og ikki undirmeta tann týdning, býirnir hava í hesum høpi, tí tað er í býunum, at størstu átøkini fyri einum betri veðurlagi kunnu takast.

### Býirnir gera stóran mun

Serliga veðurlagsráðstevnan fyri borgarstjórar úr øllum heiminum, “Climate Summit for Mayors”, hevur ikki so lítið at siga í sambandi við endaligu veðurlagsavtaluna, tí býirnir, sum borgarstjórarnir umboða, fegna um meiri enn helmingin av heimsins fólk, umframt at teir umboða fleiri av heimsins størstu búskapum.

Eisini telur við, at útivið 75 prosent av heimsins útláti av vakstrarhúsgassi kemur frá býarøkjunum, ið tí kunnu gera sera stóran mun, taka tey veðurlagsavbjóðingina í fullum álvara. At tey gera tað, er yvirlýsingin besta prógv fyri, og nú vóna allir borgarstjórarnir, at heimsins leiðarar í sama álvara finna eina semju um, hvat best er at gera fyri at tálma støðugt hóttandi veðurlagsbroytingunum.

Seinnapartin hevur Heðin Mortensen saman við hinum borgarstjórarunum verið við til sjálva setanina av politiska partinum av altjóða COP15-veðurlagsráðstevnuni í Bella-sentrinum, og hann verður eisini við, tá borgarstjórarnir í morgin aftur fara á altjóða ráðstevnuna, har teir fara at handa stjórnarleiðarunum yvirlýsingina, teir allir í felag undirskrivaðu í dag.